HB-EB/Streymur 2-0 (0-0):

# So var gullið heima

**Leingi stóð heilt nógv á oddaliðnum, men teir fingu at enda togað seg til ein 2-0 sigur, og tá so úrslitini úr hinum dystunum vóru greið, var meistaraheitið staðfest**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*So er tað heima. Bæði NSÍ og KÍ vóru aftan fyri í sínum dystum, og við málinum til 2-0 hevur Hans á Lag staðfest sigurin og meistaraheitið hjá HB*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Rakettirnar brustu og áskoðararnir tyrptust kring vøllin. Enn vóru sjey minuttir eftir av dystinum í Runavík, har NSÍ lá undir við einum máli, men hjá HB-áskoðarunum var eingin ivi. Skinnið varð selt dekan ov tíðliga, men bjørnin varð tó at enda eisini skotin, og so var tað staðfest, sum seinastu tvær vikurnar hevur tókst sum ein veruleiki. HB er føroyameistari 2002.

## Gummibein

Hetta var støðan, tá dysturin í Gundadali millum HB og EB/Streym var liðugur, men undan hesum vórðu bæði leikarar og viðhaldsfólk hjá HB hildin á pínubeinkinum av einum væl stríðandi EB/Streymi liði, sum ongan tíð gav skarvin yvir, men fram til tað seinasta bardist fyri sínum møguleika at skapa sensatiónina.

Serstakliga í fyrra hálvleiki vóru gestirnir væl við, og yvir høvur hevði tú hesi trý korterini ilt við at fata, at talan var um eitt oddalið, sum á heimavølli skuldi vinna á einum botnliði. HB fekk snøgt sagt ikki ta ferð á spælið, sum annars hevur eyðkent liðið seinastu dystirnar, og tó at bólturin ferðaðist nógv á gestahálvuni, so var talan um fáar fyri ikki at siga ongar upplagdar málmøguleikar.

Tað líktist teimum so væl kendu gummibeinunum, sum leikarar ofta fáa, tá nógv stendur upp á spæl, og sama gongdin tóktist eisini gera seg galdandi eftir steðgin. Yvirvágin hjá HB gjørdist kanska størri fyri hvønn minutt, sum gekk, men teir høvdu framvegis ilt við at skapa teir opnu møguleikarnar. Nakrar miseydnaðar frísparksroyndir var tað mesta, sum spurdist burturúr. Og so mundi enntá gingið heilt galið í einasta veruliga møguleikanum, sum EB/Streymur hevði eftir steðgin, men lukkutíð fyri HB kundi Jan Dam á sjálvari málstrikuni seta høvdið fyri, tá Jákup Martin Joensen annars tóktist hava sent EB/Streym á sigurskós.

## Forloysingin

Hóast laku úrtøkuna á vøllinum, so var fagnaðurin í HB-skýlinum óførur stóran part av dystinum. Ivaleyst høvdu tey trúnna uppá, at teirra menn megnaðu at gera tað, sum skuldi til, og tá Útvarpið visti at siga, at bæði KÍ og NSÍ vóru aftan fyri í sínum dystum, tóktist í øllum førum eingin vandi fyri, at FM-møguleikin skuldi gleppa teimum av hondum.

Í ringasta føri skuldi talan gerast um at útseta veitsluna í eina viku, men burtur úr mest sum ongum kom so forloysingin eitt korter fyri leiklok, tá Andrew av Fløtum fylgdi upp, eftir at Rúni hevði roynt seg við skoti. Vinkulin var kanska spískur, men hann lá til vandamikla vinstra-beini, og við einum fløtum skoti sendi toppskjúttin í 1. deild bóltin í meskarnar, og so mundi fagnaðurin neyvan fingið nakran enda. Við øllum liðfeløgunum í hølunum rann Andrew við berum yvirkroppi yvir móti HB-húsinum, og bæði skiftistbonkur og áskoðarapláss vóru í leysum lofti.

## Drama og avgerðin

Fagnaðurin var øgiligur. Trummurnar hjá Oskari og nú hásu røddirnar hjá fjøldini fyltu Gundadal, og tí var antiklimaksið stórt fáar minuttir seinni, tá alt brádliga sá út til at rapa fyri HB.

Jón Sigurd Gleðisheyg fekk um beinini hjá Bárði Johannesen, tá hesin var fyrstur eftir einum langum bólti. Kanska gjørdi Bárður dekan ov nógv av, tá hann fór bóltandi avstað, og ivaleyst hevði Ronnie Samuelsen eisini onkra viðmerking um hetta mótvegis málverjanum, sum fullkomuliga misti høvdið hesa løtuna. Ronnie varð skumpaður um koll, og so var dómarin eirindaleysur, tá hann togaði reyða kortið fram.

HB heðvi nú bert tíggju mans á vøllinum seinastu tíggju minuttirnar, og eina løtu var eisini líkt til, at geistnir ætlaðu at gera sær dælt av hesum. Spælið varð við eitt flutt nógv longur niðan á vøllin, men heldur enn at geva EB/Streymi nakrar møguleikar, tóktist hetta geva HB møguleikan fyri kontra, og sjey minuttir fyri leiklok varð sigurin so sligin rimmarfastur.

Hans á Lag, sum í ár hevur ment seg til kanska besta høgra bakk í landinum, bandaði seg leysan saman við Rúna, og tá Gunnar á Steig kom út, var verjuleikarin ísakaldur og sendi flatt í kassan.

Hetta var mønustingurin hjá EB/Streymi og tað vistu HB-leikararnir eisini. Restina av dystinum var bert ein spurningur um at fáa tíðina at ganga, og í roynd og veru hevði HB fleiri møguleikar hesar sjey minuttirnar, enn teir høvdu teir 83 undanfarnu, men at úrtøkan ikki varð størri, kundi vera tað sama. HB vann dystin. Teir vunnu meistaraheitið, og tað er væl saktans tað, sum telur í seinasta enda.

### Dysturin í tølum

**HB-EB/Streymur**
**2-0 (0-0)**
1-0: Andrew av Fløtum, 75
2-0: Hans á Lag
Dómari: Dagfinn Olsen. Hevði fyri tað mesta ein friðarligan sunnudag, men í ávísum førum var tó um reppið, at dysturin glapp honum av hondum, tí hann ikki var nóg konsekventur mótvegis leikarunum.
HB: Bárður Johannesen – Hans á Lag, Jóhannis Joensen, Jan C. Dam, Janus M. Joensen – Rúni Nolsøe, Nico Dogaru, Rógvi Jacobsen – Jón Rói Jacobsen, Nocko Jokovic, Andrew av Fløtum
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Andrzej Pacek, Knút V. Vesturtún, Eyðfinn Joensen – Jákup Martin Joensen, Marni Djurhuus, Ronnie Samuelsen – Teitur Joensen, Jón Sigurð Gleðisheygg, Sorin Anghel



*HB eru meistarar. Eftir at hava biðað síðani 1998 sluppu viðhaldsfólkini hjá felagnum endiliga aftur at fegnast, og hetta varð gjørt við manér, tá rakettir vórðu skotnar í loft, samstunds meðan trummurnar og rópini av áskoðaraplássunum royndu at doyva buldrini, sum hesar bóru við sær*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Regnið var kanska órógvandi fyri myndagóðskuna her hjá okkum, men gleðin hjá HB mundi kortini vera óskalað, tá meistaraveitslan varð blást í gongd við seinasta bríkslinum í dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*


*Nocko Jokovic varð keyptur til Føroya fyri at avgera meistaraheitið, og tó at hann kanska ikki hevur skotið so nógv mál, so var júst hendan løtan í Runavík avgerandi, tá hann við uttaru síðuni smekkar bóltin í kassan*

# Virðiligir meistarar

**Landsins bestu verju, ein hart arbeiðandi miðvøll og eitt lívshættisligt álop. Tað var uppskriftin til meistaraheitið hjá HB, sum kom til høldar hóast bæði innanhýsis órógv og venjaraskifti í úrtíð**

MEISTARAR
*Jákup Mørk*

HB eru føroyameistarar 2002. Tað er ein staðfesting, nú næst seinasta umfar er farið aftur um bak, og í roynd og veru hevur tað eisini verið væntandi, síðani teir fyri tveimum vikum síðani vunnu týdningarmikla toppdystin í Runavík, tí eftir hetta vóru bert dystir eftir móti teimum trimum – á pappírinum – veikastu liðunum í deildini.

Tað vil við øðrum orðum siga, at hóast HB hevði havt torførastu dystarskránna fram til tá, so høvdu teir skapt sær ta best hugsandi útgangsstøðið áðrenn sjálvan endaspurtin, og so kann tað gera tað sama, at kappingin kanska var løgd eitt sindur óheppið til rættis í so máta. Øll liðini skulu sum kunnugt spæla tvær ferðir móti hvørjum øðrum, og tá hetta er av, er ovasta liðið meistari. Jú, fótbóltur er í veruleikanum eitt einfalt spæl.

## Einfalt

Og júst tað einfalda hevur í einum annars turbolentum ári verið leyklaorðið hjá HB. Ikki so ofta hevur spælið verið av tí meira reyptandi, men stútt og støðugt eru sigrarnir togaðir heim.

Við eini verju, sum ivaleyst er hin besta í landinum í ár, hav teir fyri tað mesta lagt dentin á halda mótstøðumonnunum frá at skorað, fyri síðani at avgera dystin, tá møguleikin beyðst. Eitt nú hevur miðverjan verið somikið væl mannað, at Hans á Lag – sum annars man vera ein tann besti miðverjin í landinum – í ár er umskúlaður til ein tann besta høgra bakkin í landinum. Ein høgri bakkur, sum helst endar árið sum triðbesti málskjúttin hjá liðnum. Og tað sigur heldur ikki so lítið, at seinastu ferð, at mál er farið ígjøgnum hjá HB, var, tá teir 25. august vunnu 3-0 í Gøtu. Og at breiddin í so máta var í lagi, var eisini sjón fyri søgn, tá Janus M. Joensen undir landsliðsvenjing meiddi sær knæið, uttan at hetta tó sást aftur í úrslitunum hjá HB.

## Hart arbeiði

At verjan stóð seg somikið væl, komst eisini av, at HB í ár hevur havt ein sera sterkan miðvøll, sum í nógvar mátar hevur verið førur fyri at steðgað spælinum, áðrenn tað gjørdist alt ov vandamikið.

Serstakliga hava tað her verið Rúni Nolsøe og Rógvi Jacobsen, sum hava gjørt tað tunga arbeiðið, meðan Hallur Danielsen og Nicu Dogaru so hava stríðst um seinasta plássið í vanligu 4-3-3 útgangsstøðuni. Hendan dystin vann rumenin, sum árið leið, men at hava ein leikara við evnunum hjá Halli at bróta mótstøðuverjuna sitandi á beinkinum, man bara vera nakað, sum ein venjari kann frøast um.

## Licensi to kill

Eingin dystur verður tó vunnin við eini tryggari verju og hørðum arbeiði einsamøllum. Mál skulu til fyri at avgera dystirnar, og hesum hevur HB-álopið eisini megnað at staðið fyri.

Fyrst og fremst hevur tað sjálvandi verið toppskjúttin, Andrew av Fløtum, sum hevur staðið fyri hesum, og hóast ikki færri enn átta av málunum hava verið brotsspørk, so telja tey eins nógv sum alt annað, og skal ikki nakað verða tikið frá honum av hesi orsøk.

Afturat sær hevur toppskjúttin so havt Jón Róa Jacobsen, sum hóast sín unga aldur longu er ein av berandi kreftunum á liðnum, og spurningurin er kanska meira enn nakað, hvussu leingi hann fer at spæla við HB, áðrenn kósin gongur av landinum, og so hava tveir av teimum allarbestu forwardunum í føroyskum fótbólti verið miðdepilin í álopinum. Fyrst var tað Uni Arge, sum tíverri mátti leggja frá sær, tá ryggurin av álvara fór at biðla, men maður kemur tó í mans stað, og her hevði leiðslan í HB eina hepna hond, tá tað eydnaðist at fáa Nocko Jokovic til landið. Tað kann væl vera, at tað bert hevur verið talan um trý mál higartil frá honum, men verður hugt at, hvar hesi vórðu skotin, er skjótt at staðfesta, at uttan hann hevði HB neyvan verið meistari longu nú. Eitt í Gøtu í týdningarmikla 4-3 sigrinum og so tey bæði í Runavík, tá meistarakósin varð sett við 2-0 sigrinum.

Tað er í hesum sambandi vert at leggja til merkis, at stutta kreppan, sum HB upplivdi miðskeiðis í kappingarárinum, kom júst í tíðarbilinum frá tí at Uni varð noyddur at gevast fram til Nocko Jokovic kom til landlið.

## Viljin fram um alt

Og at enda, so skal tað eisini við, at liðið hjá HB í ár hevur sýnt munandi størri viljastyrki enn í fjør. Ta ferðina varð árið mest sum oyðilagt av skaðum, men at sjeynda plássið á talvuni hevur tikið fast, er helst einki at ivast í. Hvør sum ein hava leikararnir í ár stríðst fyri at vaska tann blettin av sær, og ikki minst kom hetta til sjóndar, tá venjaraskifti í úrtíð gjørdi stríðsviljan enn meira neyðugan. Mest sum øll hildu, at nú var HB við at ver úti – og dysturin í Gøtu var kanska seinasti møguleikin – knýttu teir nevarnar eina ferð eyka, og síðani hevur tað bert gingið ein veg við fimm sigrum á rað. Tað allar tyngsta í fótbólti er helst at reisa teg, tá tú annars liggur niðri, men hetta megnaði HB, og hendan viljastyrkin var kanska júst tað, sum tryggjaði teimum meistaraheitið í seinasta enda.